ítróttur

Nr. 164 • týsdagur • 2. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fleiri landsliðsspælarar av vøllinum við skaða

**Men alt bendir á, at Henrik Larsen fer at hava allar sínar kosnu menn við sær, tá ið leiðin í annaðkvøld gongur til Skotlands**



*Hans Fróði Hansen var ein av leikarunum, sum noyddist av vøllinum við skaða um vikuskiftið, men sjálvur roknar hann ikki við, at hetta fer at bila á skotlandsferðini*

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í annaðkvøld lættir landsliðið úr Vágum við kós ímóti Glasgow, har næstsíðsta uppgerðin í hesum EM undankappingar umfarinum verður á skránni leygardagin. Atlantsflog skal undan leygardegnum flyta nógvar føroyingar til Glasgow. Teir, sum skulu stríðast á vøllinum, vera teir fyrstu avstað, og so skulu teir næstu dagarnar fyrireika seg undir venjing, hvíla seg og sinniliga tuna seg inn á stóru avbjóðingina.

Føroyar hava framvegis fyrsta stigið til góða á skotskari jørð. Men tað var tætt við fyri fimm árum síðani. Ta ferðina vann Skotland 2–1 í Aberdeen. John Petersen skoraði føroyska málið upp á brotsspark, eftir at Todi Jónsson varð feldur. Bæði tey skotsku málini vóru óheppin. Í øðrum førinum snýtti skotið Jákup Mikkelsen, tí bólturin tók í beinið á Jens Kristiani Hansen, og í hinum førinum vóru føroysku spælararnir meiri ella minni givnir at spæla, tí tað í sambandi við innkast frammarlaga í skotsku vinstru síðuni vóru tveir bóltar á vøllinum.

At Føroyar ikki skulu avskrivast ímóti Skotlandi, varð staðfest fyri einum ári síðani, tá ið Skotland var á Svangaskarði. John Petersen legði Føroyar á odda bæði 1–0 og 2–0, og hann hevði gyltan møguleika at økja til 3–0, áðrenn Skotland tvær ferðir svaraði aftur og javnaði til 2–2. Um Føroyar vóru komnar framum 3–0 man lítil ivi vera um, at tað hevði eydnast at vinna, og so hevði Berti Vogts neyvan staðið við róðrið, tá ið Skotland leygardagin fer at taka ímóti Føroyum á Hampden Park í Glasgow. Síðani ferðini í Føroyum hevur hilnast so mikið væl hjá Skotlandi, at teir framvegis hava møguleika at sleppa upp í part í endaspælinum í Portugal næsta summar.

### Fleiri av vøllinum

Tríggir landsliðssspælarar vóru ikki í eldinum fyrrenn í gjárkvøldið. Talan var um Jens Martin Knudsen og Helga L. Petersen, sum við NSÍ skuldu spæla á heimavølli ímóti EB/Streymi, og um Julian Johnsson, sum í gjárkvøldið skuldi spæla við ÍA á útivølli í Reykjavík ímóti Fylkir.

Tá ið B68 vann 2–0 í Miðvági, vísti Fróði Benjaminsen, sum var leikbannaður, tá ið Føroyar á heimavølli taptu 2–1 ímóti Íslandi, stórspæl. Bæði í verjukenda leiklutinum og í framrættaða spælinum var hann rættuliga sannførandi. Jann Ingi Petersen stríddist væl, og hann skoraði 2–0 málið eftir framspæl frá – Fróða Benjaminsen.

Tveir aðrir landsliðsspælarar vóru á vøllinum í Miðvági, har Jógvan Martin Olsen var millum áskoðararnar. Tað hevði hann møguleika fyri, tí NSÍ ikki spældi fyrrenn í gjárkvøldið.

Felags fyri bæði Hans Fróða Hansen og Jóhannus Joensen var, at teir í 2. hálvleiki noyddust at taka seg av vøllinum, tí teir vóru skaddir. Í báðum førinum var talan um liðbandsskaða í knænum. Sum vit hava skilt tað, so er í báðum førunum talan um so mikið smáar snuddir, at spælararnir fara at koma fyri seg undan uppgerðini leygardagin.

Hans Fróði varð skaddur í samanbresti við viðspælara longu í 2. minutti. Hann var uttanfyri eina løtu, men so kom hann aftur á vøllin og treiskaðist í ein tíma.

– Talan var um sera óhepna støðu, har Kristian Anton Andreasen, sum elti mótstøðumann, datt omanyvir beinið hjá mær. Pínan í knænum var nógv, men eftir viðgerð royndi eg at treiskast. Hugurin at fara út var lítil, nú tað gongst so væl hjá okkum. Eg havi verið hjá fysioterapeuti í morgun og skal aftur fáa viðgerð seinni í dag. Tað tykist sum um pínan er minni nú, segði Hans Fróði Hansen á middegi í gjár.

So tú ætlar tær ikki at geva avboð til landsliðið?

– Tað vóni eg sanniliga ikki verður neyðugt. Eg eri sera uppsettur at fylgja møguleikanum, sum eg aftur havi fingið at vera á landsliðnum. Dystuirn verður ikki fyrrenn leygardagin, og tá rokni eg heilt víst við at vera tøkur. Á landsliðnum er eisini møguleiki støðugt at fáa viðgerð frá góðum fysioterapeutum, sigur Hans Fróði Hansen, sum sigur seg hava skilt, at Jóhannus Joensen eisini tykist koma fyri seg so mikið skjótt, at hann ikki nýtist at geva avboð til Skotlands ferðina.

### John og Jákup fingu úrtøku

Stóri trupulleikin á landsliðnum hevur seinastu ferðirnar verið at spæla seg til møguleikar og at fáa mál. Helgi L. Petersen fekk ikki møguleikan fyrrenn í gjárkvøldið. Hjá Jákupi á Borg og John Petersen gekk væl í Klaksvík. Báðir megnaðu teir at skapa sær sjálvum møguleika og at fáa fulla úrtøku burturúr.

Í Gundadali hilnaðist tað ikki væl hjá Andrew av Fløtum, sum var komin aftur eftir leikbann í Gøtu. Andrew, Rógvi Jacobsen, sum var miðframherji, og hinir HB spælararnir megnaðu ikki at fáa mál burturúr stóru leikligu yvirvágini ímóti VB.

Nýggja navnið í landsliðshópinum, Christian Lamhauge Holst, var við Lyngby í donsku 2. deildini í Brabrand, har úrslitið varð 2–2. Christian fekk einki mál hesa ferð.



KÍF-B36 2-2 (2-1):

# B36 tók alt í Klaksvík



*B36'arar fóru væl hýrdir úr Klaksvík um vikuskiftið*

2. DEILD KÍ–B36
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað hevur hilnast illa hjá tveimum teimum bestu KÍ liðunum tvey tey seinastu vikuskiftini. Eftir tvey tap á rað eru bæði 1. og 2. deildarliðini fokin í kappingini um heiðursmerkini. Fyrst vóru liðini á Svangaskarði, har B68 tók alt, og í hesum vikuskiftinum var tað B36, sum fór við báðum sigrunum úr Klaksvík.

Carl H. Høgnesen legði leygardagin B36 framum, men Kristian á Lakjuni javnaði til 1–1 við langskoti. Kristian, sum fyri trimum árum síðani taldist millum fremstu fótbóltsevnini í Klaksvík, hevur ikki hildið seg havt tíð til fótbólt seinastu tíðina, og hann verður ikki at síggja nógv á KÍ liðum næstu tíðina, tí hann ætlar sær av landinum. Men leygardagin vísti hann, at evnunum bila einki.

Undan steðginum legði miðvallarin Dávid Bertholdsen KÍ framum, men í 2. hálvleiki kiksaði hjá KÍ. Áki Mørk javnaði beinleiðis upp á fríspark, og Tórður Hentze skoraði B36 sigursmálið, tá ið tað restaðu fýra minuttir.

B36 var í summarsteðginum millum evnini til niðurflyting. Sjúrður Norðbúð hevur síðani tá havt ábyrgdina av næstbesta B36 liðnum, og tað hevur gingið sum eftir ánni. B36 hevur spælt fimm dystir. Teir hava bara tapt ímóti ÍF. Úrtøkan hevur verið tólv stig, og nú eru teir væl og virðiliga komnir undan allari hóttan um niðurflyting. Um heilt væl vil við, so fer B36 kanska at vera við í kappingini um bronsumerkini.

Næsta vikuskifti vera avbjóðingarnar stórar bæði hjá B36 og KÍ. B36 skal spæla á heimavølli ímóti TB, ið rættuliga hevur fingið undanvind, meðan KÍ skal royna seg ímóti oddaliðnum í Fuglafirði

**2. deild KÍ–B36 2–3 (2–1)**
0–1: Carl H. Høgnesen
1–1: Kristian á Lakjuni
2–1: Dávid Bertholdsen
2–2: Áki Mørk
2–3: Tórður Hentze

## Sigrid og Katrin á sætta plássinum

**Tað eydnaðist ikki føroysku kvinnunum at vinna heiðursmerki, men tær vóru væl nøgdar kortini**

Sum vit nevndu í seinastu viku, so vóru Katrin Olsen og Sigrid Svartá við í bátinum hjá Danmark, sum á fyrsta sinni vann seg fram til HM-finaluna í kappróðri fyri fýrarar.

Finalan í hesum varð rógvin sunnudagin, og her gjørdist danski báturin nummar seks av teimum seks bátunum, sum vóru í finaluni.

Hóast tær soleiðis endaðu á aftasta plássinum í finaluni, so tóktust tær báðar væl nøgdar, tá Útvarpið fekk fatur á teimum sunnudagin, og tað kunnu tær sum so eisini vera. Tí hóast talan ikki gjørdist um heiðursmerki, so eru tær nú millum tær seks bestu manningarnar í heiminum, og tað skuldi verið løgið, um tær báðar ikki eisini ætla sær at royna at betra um hetta komandi árini.

**-jm**

# Skotska liðið klárt

**Berti Vogts hevur gjørt av, hvørjar leikarar hann setir álitið á, tá Føroyar koma á vitjan**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fríggjadagin boðaði Berti Vogts frá, hvussu skotska landsliðið fer at síggja út, nú dystirnir móti Føroyum og Týsklandi standa fyri framman.

Kevin Harper and Paul Dickov have been brought into Berti Vogts' Scotland squad for the Euro 2004 double header against the Faroe Islands and Germany. With Kenny Miller having failed to regain fitness, the manager has extended his options up front with the two attack minded players from promoted Premiership clubs Portsmouth and Leicester, while James McFadden and Steven Thompson return from injury.

Lat tað verða sagt beinanvegin, at Vogts ikki hevði nakra bumbu av sama slag, sum tann hjá Henrik Larsen, men á sama hátt sum hjá okkum ræður tó um at finna røttu menninar til álopssessirnar. Her hevur tað verið ein trupulleiki, at Kenny Miller hevur verið skaddur, og hann er enn ikki somikið birgur, at hann setur seg føran fyri at spæla. Fyri at styrkja um hendan partin av liðnum, hevur Vogts tí tikið James McFaden og Steven Thompson á liðið. Eisini Don Hutchinsson og Paul Dickov eru millum teir, sum skulu stríðast um framrættaðu sessirnar, so føroyska verjan fær helst sítt at síggja til.

Liðið hjá Skotlandi sær annars soleiðis út:

**Málverjar**
Neil Alexander (Cardiff City)
Robert Douglas (Celtic)
Paul Gallacher (Dundee United)
**Verja**
Graham Alexander (Preston North End)
Steven Caldwell (Newcastle United)
Christian Dailly (West Ham United)
Steven Pressley (Heart of Midlothian)
Maurice Ross (Rangers)
Andy Webster (Heart of Midlothian)
Lee Wilkie (Dundee)
**Miðvøllur**
Colin Cameron (Wolverhampton W.)
Paul Devlin (Birmingham City)
Barry Ferguson (Rangers)
Kevin Harper (Portsmouth)
Paul Lambert (Celtic)
Jackie McNamara (Celtic)
Gary Naysmith (Everton)
Gavin Rae (Dundee)
**Álop**
Stephen Crawford (Dunfermline Athletic)
Paul Dickov (Leicester City)
Don Hutchison (West Ham United)
Neil McCann (Southampton)
James McFadden (Motherwell)
Steven Thompson (Rangers)

# Løggan skal kappast

**Ein heldur øðrvísi ítróttardagur verður á skránni hjá politinum týsdagin**

COP-CUP
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verður ein ítróttardagur av teimum heldur sjáldsomu, tá føroyskir løgreglumenn týsdagin fara at royna seg í sonevndu Cop-Cup kappingini.

Hetta er ein kapping við ikki færri enn 16 kappingargreinnum, og skulu allar avgreiðast innan ein og sama dag. Í fleiri førum er eisini talan um heldur alternativar ítróttagreinar. Eitt nú í pletfisk, har teir við sleingjutráðu skulu kasta ein dartpíl móti skivuni.

Dagurin hjá løgreglumonnunum byrjar snimma á morgni í Gundadali, har fótbóltur er á skránni, og so gongur bara slag í slag. Nakrar av kappingunum ganga fyri seg innandura, og verða hesar í Gundadalshøllini, umframt at Svimjihøllin eisini skal nýtast.

Sum navnið sigur, so er talan um eina kapping fyri løgreglufólk, og verða tað 20 av slagnum, sum fara at royna seg týsdagin. Av navnalistanum framgongur, at talan í nógvum førum er um nøvn, sum hava gjørt um seg í øðrum sambandi í føroyska ítróttarheiminum, so einki er at ivast í, at nógv verður lagt fyri í royndunum at vinna.

Og so skulu vit eisini heilsa og siga, at hóast hetta, so verður nóg mikið av fólki til arbeiðis hjá løgregluni týsdagin, so tey óttast á ongan hátt, at lógloysi fer at gera um seg, meðan kappast verður.